





Ítróttardagur

Stuðulstænastan

# Ítróttardagur

Stuðulstænastan hjá Nærverkinum bjóðar til ítróttardag á ovara vølli í Gundadali mikudagin 18. maj 2009 kl. 8.30-16.

Vit møtast í B-36 húsinum kl. 8.30 til morgunmat, kunning, setan og innskriving.

**Skrá fyri ítróttardagin:**

| | |
|---|---|
| 08.30 | Innskriving + luttøkugjald<br>Tórshavnar komuna bjóðar morgunmat. |
| 09.15 | Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, bjóðar vælkomin. |
| 9.45 | Upphiting. |
| 10.00 | Fótbóltur og boccia. |
| 11.30 | Kaffi/te, køkur og frukt. |
| 12.15 | Stafett-kapping og postarenning |
| 13-14 | Bowling |
| 14.00 | Borðhald í bowlinghøllini |

Ítróttardagurin er ætlaður persónum við avmarkaðum sálarligum førleika og starvsfólkum, ið arbeiða innan hetta økið. Brúkarar og starvsfólk luttaka á jøvnum føti í teimum ymisku ítróttargreinunum.

Endamálið við ítróttardegnum er fyrst og fremst at hava tað stuttligt saman, at røra seg og ikki minst at knýta bond millum tey luttakandi.

Um onkur ikki kann/vil luttaka í kappingunum, er viðkomandi tó vælkomin við sum fjeppari.

Kappast verður í hesum ítróttargreinunum:
Fyrrapart: Fótbóltur og boccia
Seinnapart: Stafett-renning og postarenning

Til ber at luttaka í 2 ítróttargreinum – einari fyrrapart og einari seinnapart. Í samband við innskrivingina verður boðað frá hvørjari grein ein ynskir at luttaka í.

Tá kappingarnar eru lidnar verða heiðursmerki latin vinnandi liðunum og einstaklinginum.

Boðast skal frá luttøku í seinasta lagi mánadagin 16.05 á tlf. 764142, 764141 ella við at senda ein teldupost til: judithj@naerverk.fo. sjurdurj@naerverk.fo.

Luttøkugjaldið á kr. 150 skal gjaldast í samband við innskriving kl. 8.30.

Við í prísinum er morgunmatur, frukt, kaffi/te, køkur og borðhald.

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo



# Lærarastørv
## á vinnuháskúlanum

Í samband við økta virksemi og næmingatal Vinnuháskúlans, verður søkt eftir lærarum fyri seinna hálvár 2011 og fyrra hálvár 2012. Talan er um tímalærarastørv og farloyvisstørv.

Undirvísingin fevnir serliga um niðanfyristandandi lærugreinar:

| | t/viku |
|---|---|
| Støddfrøði B | 8 |
| Alisfrøði B | 7 |
| Støddfrøði C | 8 |
| Alisfrøði C | 7 |
| Evnafrøði C | 15 |
| Enskt C | 30 |
| Virkisbúskap | 14 |
| Leiðsla og fyriskipan | 13 |
| Navigatión | 14 |
| el-lærugreinar | 22 |
| Maskinlærugreinar | 20 |

Førleikakrøv
Lærarar, sum undirvísa í útbúgvingum eftir galdandi kunngerðum, skulu: Hava útbúgving sum maskinmeistari ella skipsførari, hava 2 ára starvsroyndir og hava staðið bachelorútbúgving frá hægri lærustovni.

Umsøkjari, ið hevur bachelor- ella kandidat-útbúgving í einari ella fleiri lærugreinum, kann undirvísa í hesum lærugreinum.

Umsóknin skal sendast til Vinnuháskúlan, Noatún 7, Postsmoga 104, FO-110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Johannes á Brúgv, stjóra.

Freist
Umsóknir við avriti av prógvum og CV skulu vera Vinnuháskúlanum í hendi tann 17. mai 2011.

KREA - TEL 60 80 80

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · vh.fo

Innlendismálaráðið

# Stuðul til alternativar orkuverkætlanir

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan á 1,4 mió. kr., hvørs endamál er at menna loysnir innan varandi orku og orkukeldur, so vit gerast minni heft at oljuni og minka útlátið av vakstrarhúsgassum. Stuðul kann latast verkætlanum, hvørs endamál er at menna loysnir, sum stuðla undir og fremja Veðurlagspolitikk Føroya.

Tað er ein treyt, at umsóknir um stuðul hava 10% sum eginfígging ella aðra fígging, soleiðis at mesti stuðulin, sum søkjast kann um, er 90% av samlaðu verkætlanarútreiðslunum.

Til ber hjá virkjum, feløgum, kommunum og einstaklingum at søkja um stuðul.

Umsóknir skulu skrivast á serligt umsóknarblað
Umsóknarblað og reglugerð kunnu heintast á heimasíðu Innlendismálaráðsins www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

**Freistin at søkja um stuðul er 23. mai 2011.**

**Umsóknir skulu sendast til:**

**Innlendismálaráðið**
Postboks 159
110 Tórshavn